## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og stundum regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, sum frálíður vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og +2 stig.

# Virðisløntar bøkur á føroyskum

VIRÐISLØN
*tíðindaskriv*

Stutt undan páskahøgtíðini varð kunngjørt, at Litteraturpriset till Astrid Lindgrens minne í ár verður latin 59 ára gamla bretska rithøvundinum Philip Pullman og japanska myndprýðaranum Ryôji Arai.

Á føroyskum eru higartil tríggjar bøkur komnar út eftir Philip Pullman. Tað eru fyrstu bøkurnar í bókarøðini um Myrkursins frumevni *Norðlýsi* og *Tvíeggjaði knívurin*, og ævintýrið um *Aladdin og gandalampuna*, ið Philip Pullman hevur endursagt og Gunnar Hoydal hevur týtt. Seinni í ár kemur triðja og seinasta bókin í bókarøðini út, *Ravkikarin*. Hjalmar P. Petersen hevur týtt.

Grundgevingin at lata Pullman virðislønina, er, at hann er eitt meistarligt frásøgufólk innan fjølbroytt tekstasløg — hann skrivar søguligar skaldsøgur og fantasy, sosial realismu og parodi. Bøkur hansara skara framúr málsliga og hava sálarligt innlit, og høvundurin stendur altíð undir liðini á lesaranum, setir spurnartekin við myndugleikar, boðar humanismu og kærleika, og heldur fast í síni optimistisku trúgv á barnið, eisini tá ið støðan tykist vónleys.

Endamálið við Bókmenta-virðislønini til minnis um Astrid Lindgren er at vekja áhuga og ans um barna- og ungdómsbókmentir. Virðislønin varð stovnað av svensku stjórnini sama ár sum Astrid Lindgren doyði í 2002. Virðislønin verður latin á hvørjum ári og er 5 mió. svenskar krónur. Sostatt er hon heimsins størsta virðisløn, ið verður latin barna- og ungdómsbókahøvundum og myndprýðarum. Ikki minni enn 118 vóru í uppskoti til virðislønina hesa ferð.







*Bøkurnar um norðlýsið og tvíeggjaða knívin eru tvey av trimum verkum hjá Pullman, sum eru týdd til føroyskt*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -8 |
| Nuuk | -11 |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 10 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 13 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 20 |
| New York | 15 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1034 hPa. yvir Suður-Noreg fer í landsynning. Eitt lágtrýst, 1004 hPa. vestan fyri Írland á 50N-25V fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Íslandi fer í landnyrðing og hevur sum frálíður kaldari luft við sær.

GEVIÐ BLÓÐ

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/3 kl. 06[00]– 31/3. 06[00]. Hitin í gjár: 6,5°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 30/3 kl. 06[00]– 31/3 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 65,2 mm

Sosialurin

### VESTFALLSKYRRINDI

1. apríl

19. mars Mánin longst frá jørðini
25. mars Fullmáni
2. apríl Seinna kvarter
4. apríl Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. apríl | 00.04 | 12.34 | 11.34 | - | 11.49 | - | 02.04 | 14.34 | 03.04 | 15.34 | 10.49 | 23.31 | 09.49 | 22.31 | 00.19 | 12.49 | 01.19 | 13.49 | - | 12.19 | 01.04 | 13.34 |
| 2. apríl | 01.16 | 13.59 | 00.16 | 12.59 | 00.31 | 13.14 | 03.16 | 15.59 | 04.16 | 16.59 | - | 12.14 | 11.14 | 23.56 | 01.31 | 14.14 | 02.31 | 15.14 | 01.01 | 13.44 | 02.16 | 14.59 |
| 3. apríl | 02.41 | 15.23 | 01.41 | 14.23 | 01.56 | 14.38 | 04.41 | 17.23 | 05.41 | 18.23 | 00.56 | 13.38 | - | 12.38 | 02.56 | 15.38 | 03.56 | 16.38 | 02.26 | 15.08 | 03.41 | 16.23 |
| 4. apríl | 03.48 | 16.14 | 02.48 | 15.14 | 03.03 | 15.29 | 05.48 | 18.14 | 06.48 | 19.14 | 02.03 | 14.29 | 01.03 | 13.29 | 04.03 | 16.29 | 05.03 | 17.29 | 03.33 | 15.59 | 04.48 | 17.14 |
| 5. apríl | 04.39 | 17.05 | 03.39 | 16.05 | 03.54 | 16.20 | 06.39 | 19.05 | 07.39 | 20.05 | 02.54 | 15.20 | 01.54 | 14.20 | 04.54 | 17.20 | 05.54 | 18.20 | 04.24 | 16.50 | 05.39 | 18.05 |

5 707265 100050 >